# Tiltøk

**Gudstænastur sunnudagin**
**Havnar kirkja:** kl. 11
Bjarni Bæk
**Nólsoy:** kl. 12
Sonja Klein
**Kaldbak:** kl. 12
Ann D. Hansen
**Hoyvík:** kl. 11
Uni Næs. Sunnudagsskúlin fer sunnudagin at vitja sunnudagsskúlan í Vesturkirkjuni. Børnini møta í Vesturkirkjuni kl. 11 saman við foreldrunum.
**Vesturkirkjan:** kl. 11
Derhard Jógvansson. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Argja kirkja:** kl. 11
Heri Joensen. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Hests kirkja:** kl. 12
Bergur Debes Joensen
**Vestmanna:** kl. 11
Inga Poulsen Dam
**Hvalvíkar kirkja:** kl. 12
Bergtórur H. Bjarkhamar, altarg.
**Christianskirkjan:** kl. 11
Niels Pauli Danielsen
**Húsar:** kl. 11
Hanus á Gørðum
**Mikladalur:** kl. 12.15
Hanus á Gørðum, altarg.
**Skála:** kl. 11
Símun P. Jacobsen, altarg.
**Fámjins kirkja:** kl. 11
Jónsvein Bech, altarg.
**Bønhúsið í Øravík:** kl. 12.15
Jónsvein Bech, altarg.
**Æðuvík:** kl. 11
Martin R. Jacobsen
**Funningur:** kl. 12
Emil Olsen, messa
**Miðvágur:** kl. 11
David Johannesen
**Hellunar:** kl. 12
Anne Mette Greve Klemensen
**Kollafjørður:** kl. 12
Theodor E. D. Olsen
**Vágur:** kl. 11
Patrick de Neergaard, dåb
**Porkeri:** kl. 12
Patrick de Neergaard, altarg.
**Húsavík:** kl. 12
Jákup R. Hansen, altarg.
**Árnafjørður:** kl. 11
John S. Myllhamar
**Hvannasund:** kl. 12
Elsa Funding, altarg.

**Skótaguðstænasta týskvøldið 22. febr.**
**Kollafjørður:** kl. 18 í sambandi við Hugsanardagin, Theodor E. D. Olsen.

**Katolska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 hámessa v/Alrin Soosaipilai, prestur í Mariukirkjuni. Sunnudagsskúli kl. 14. Tað er tilbiðjan av Heilagan Sakramentinum í Kerit frá kl. 17 til 18. Øll eru vælkomin.

**Føroysk gudstænasta og hugnakvøld í Reykjavík**
Hugnakvøld á sjómansheiminum Ørkini í Reykjavík: 19. februar kl. 20. Hugnkvøld og fyrilestur við Magnus Brahé Jørgensen.
Føroysk gudstænasta Septuagesima sunnudag í Háteigskirkjuni í Reykjavík: 20. februar gudstænasta við altargangi kl. 14. Magnus Brahé Jørgensen.

**Fríkirkjan Oasan**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøtið v/Eivind Frøen. Hjúnarbandsskeiðið byrjar fríggjakvøldið 18. febr. kl. 19.30 og endar leygarkvøldið 19. febr. kl. 22. Verið hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Eivind Frøen.
Kl. 12 sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti
www.oasan.fo

**Hebron**
Mikudagur kl. 10 Bønarløta fyri kvinnur. Kl. 17.30 Bønarmøti við familjudøgverða
Fríggjadagur kl. 10 Bønarløta fyri kvinnur og menn.
Sunnudagur kl. 10.30: Morgunmøti. Kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Jógvan Jacobsen talar. Evni: Efesusbrævið. Hjartaliga vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hóskvøldið kl. 20 Evnið: Jes 3
Leygarkvøldið kl. 19 Sjómanskvinnuringurin á Argjum og Havn hava sjómansfest í Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum. Ólavur og Karin Miðtún koma at siga frá tíðini í Føroyingahavnini. Øll eru vælkomin.
Sunnudagur kl. 11 Sunnudagsskúli í kirkjutíð. Kl. 18 Møti við Petur F. Johannesen, Skála.

**Lívdin í skúlanum við Løgmannabreyt**
Leygarkvøldið ALIVE - ungdómsmøti kl. 21.
Sunnudagur Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10:30, lovsongur og tala kl. 12. Á familjumøtinum verður videoinnslag frá familjuni Mortensen. Á seinna møtinum, sum er kl. 12, talar Jógvan Zachariassen um "Rómbrævið 15:1-7. Alt Gudi til dýrd". Meðan seinna møtið er kl. 12, verður barnaansing, sunnudagsskúli og UngLív. Hjartaliga vælkomin.
www.livdin.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mikukvøldið kl. 19 Cellegruppa fyri menn.
Hóskvøldið kl. 20 Ung hittast í Skótasalinum. Kl. 20 Heimaforbundið fyri kvinnur í øllum aldri. Evni: Av Barnamunni.
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti v/Kommandørunum Clive og Marianna Adams. Kl. 11 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/Kommandørunum Clive og Marianna Adams.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mikukvøldið kl. 18 Vit koma saman.
Sunnudagin kl. 10 morgunmatur. Kl. 11 talar Heðin Lamhauge. UV-night kl. 19.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Mikudagur kl. 20 Felags kóri venur.
Hósdagur kl. 16 gentukóri venur. Kl. 20 Ungdómsmøti v/ Bergur Debes Joensen.
Sunnudagur kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/Eivind Frøen.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Gongutúrur: Innanoyggja**
Sunnudagin 20. febr. verður gongutúrur: Niðan við Hamrá, um Vestmannastíggj til Hósvíkar. Farið verður kl. 10 av Kunningarstovuni. Havið heit og góð gonguklæðir, ein heitan drekkamunn og matpakka við. Túrurin er brattur og eitt sindur tungur. Tilmelding á tlf. 302425,á torsinfo@torshavn.fo ella á Kunningarstovuni.

**Samkoman Marknagil Fjalsg. 2, Tórshavn**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Mikukvøldið kl. 20 Møti. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum. Verið hjartaliga vælkomin.
Fríggjakvøldið Kongsins Herlið. Vit møtast øll niðri við skoytubanan á Skálatrøð kl. 18.50 havið 20 kr við. Øll børn verða koyrd heim eftir møtið. Verið vælkomin.
Kl. 20 Ungdóms - Café.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/ sunnudagskúla. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum. Verið hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og lærumøti. Osmund Justinussen talar.
Hósdagin kl. 15.45 Gentukórið Kassia venur. Kl. 20 Ungdómsmøti. Júst Vang tosar um evnið " Herklæði Guds."
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Barnaansing í Lítla Sali. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Barnaansing í Barnarúminum.
www.ebenezer.fo

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Mikukvøldið møti kl. 20.
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/Leivur Nattestad.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikukvøldið kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur. Hetta er fyri ung.
Hóskvøldið kl. 19.30 í KFUK: Hugnaløta og andakt.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Mikukvøldið sangløta og andaktsløta kl. 20.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Onki kvøldsmøti vegna Manskórið syngur í Skopun.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/ Ragnheiður Viderø og Óløf Tungá, Manskóri syngur.

**Filadelfia Vágar**
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Edith og Jarnhold Nattestad.
Sunnudagin kl. 11 Møti. Kl. 11.30 Sunnudagsskúli. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron Vestmanna**
Hóskvøldið kl. 18.30 Barnaarbeiði. Kl. 20. Ungdómsmøti.

**Hvalvíkar missiónshúsið**
*Missiónsvika verður 16-20 febr.*
Mikudagin kl. 20 møtið við Torleif Johannesen. Marita, Hallgerð og Jóhanna syngja.
Hósdagin kl. 20 møtið við Regin Høgnisen. Manskórið úr Lorvík syngur.
Fríggjadagin kl. 20 møtið við Árna Jacobsen. Johan Edvard Fuglø og Sólfríð Justensen syngja.
Leygardagin kl. 20 møtið við Hanus á Gørðum. Streingjakórið hjá KFUM-K syngur. Innsavnan til húsið.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta við Bergtórur Hjelm Bjarkhamar. Kl. 15 Familjumøtið. Tey, sum hava ungdómsmøtið skipa fyri. Emma Hansen syngur. Kl. 18 Møtið við Hera Tróndheim. Jonhilda og Gullak syngja. Innsavnan til Heimamissiónina. Hálvan tíma áðrenn møtið verður bønarmøtið. Drekkamunnur verður hvørt kvøld. Øll eru hjartaliga vælkomin. Johs.10-11 Eg eri hin góði hirðin. Hin góði hirðin setur lív sítt til fyri seyðirnar.

**Missiónsvikan á Skála**
*15.-20. februar*
Mikukvøldið kl. 19 Bergur Debes Joensen Argir talar. Argjakórið syngur.
Hóskvøldið kl. 19 Barna- og foreldramøti. Við Marjon Poulsen Miðvág. Barnakórið á Skála syngur.
Fríggjakvøldið Tey ungu skipa fyri. Kl. 19 Reimund Langaard Leirvík talar. Hjørdis, Elin og Helena syngja.
Leygarkvøldið kl. 19 Símun P. Jacobsen prestur talar. Glyvrakórið syngur
Sunnudagur kl. 11 Altargangsguðstænasta í kirkjuni Símun P. Jacobsen prestur prædikar. Kl. 14.30 Barna- og foreldramøti, við Juliu Kass Strendur. Barnakórið á Skála syngur. Kl. 18 Sverri Steinhólm Tórshavn talar. Manskórið á Skála syngur. Innsavnan til húsið.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Leygarkvøldið kl. 20 Opið hús
Sunnukvøldið kl. 18 Sang- og vitnimøti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Maibritt Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Oddvør og Hans Jacobsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Tabor, Toftir**
Mikudagin kl. 17.30 Barnaringurin. Kl. 19.30 Bønarløta. Kl. 20 Bíbliutími
Fríggjadagin kl. 16. Seinnapartssamkoma

**Karmel á Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19 møti. v/ Sigurd Sørensen.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti v/ Ingvard Mikkelsen
Sunnudag kl. 17 Møti v/ Ásbjørn Jacobsen. Evni: Stríðið millum hitt ónda og góða, Gud og sátan. Sunnudagsskúli Um tær manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl.19.30 Bønarmøti. Kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Hósdagin kl. 17.30 Liljur
Sunnudagin kl.10.30 Møti v/Lena Løbner.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnukvøldið kl. 18 Blákrossmøti v. Alfred Olsen. Innsavnan.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti v/ Paula Høj
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Hallgerð Næs Simonsen
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 Kvinnumøti v/ Lenu Løbner.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Lenu Løbner. Barnamøti er samstundis.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/ breyðbróting.

**KFUM & K í Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Ári Samson 2. Pæt. kap 2.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18 Møti við Sólrun Poulsen. Innsavnan til útimissión. Kl. 21.00 Ungdómsmøti

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Hilmar Bech.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag-hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
**Tilhaldið verður 13 ár 12. mars.** Føðingardagur verður mánadagin 14. mars. Somuleiðis verður nevndarval mánadagin 14. mars. Tveir nevndarlimir standa fyri vali (Katrin Dahl og Eilif Samuelsen). Uppskot til nevndarvalið skulu leggjast í postkassan í gongini.
Hósdagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið, vegleiðing kl. 15-16 Arnhold Fjalstein.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Lesibólkurin hittast 24. febr. kl. 11. Vit lesa: Norska Løva, Jógvan Isaksen. Samskipari Marna Olsen.
Kl. 14-16 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Vit trena til kappingina í mai mðr.
Fríggjadagin
Kl. 9-16 Motiónarúmið opið.
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn vælkomnir.
Kl. 13-16 Prát.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Pensionistafelagið í Havn**
*Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
Vit hittast í Losjuni.
Limirnir hittast í Losjuni.
Mikudagin 16. februar kl. 18 hevur felagið bingo í Losjuni.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Calarasi Missiónin**
Hjálp okkum at geva svongum børnum í Romenien eina heita máltíð um dagin. Konto í Eik: 9181 4252669
Bank Nordic: 6460 1618549
Takk fyri tín stuðul.

**Samuelskirkjan**
Tað er gudstænasta 1. og 3. sunnudag í mánaðnum kl. 14. Aftaná bjóðar kirkjuliðið til ein drekkamunn í kryptini. Hjálpi Føroyska Kirkjuliðinum í Keypmannahavn við at varðveita kirkjuna og føroyska prestin. Løgtingið hevur yvirtikið kirkjuna so vit mugu taka saman um hendur annars missa vit alt. Møtið fjølment í kirkju!
Guðstænastunar eru:
20. febr, 6. marts, 20. mars, 3. apríl, 17. apríl, 1. páskadag, 1. mai, 15. mai, 5. juni, 19. juni.

**Landsfelag Pensjónista**
*Tróndargøta 13, Tórshavn*
Tlf. 319394 ella 219394
Skrivstovan er opin týsdag frá kl. 13 til 16.
landsfelagpensjonista@olivant.fo

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará.*
*Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.*
Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið á Toftum**
*Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18.*
*Øll eldri eru vælkomin*

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
*Opið er: Mánadag, týsdag og mikudag frá kl. 15-18.*